## Málleyst Old Firm

Stórdysturin í Skotlandi millum Celtic og Glasgow Rangers var á skránni um vikuskiftið, men talan gjørdist hesa ferð um eina heldur tama útgávu av klassikaranum. Hóast Chelsea roytdi at trýsta, so eydnaðist teimum ongan tíð at bróta verjumúrin hjá Rangers, og so endaði alt á sama hátt, sum tað byrjaði. Celtic er í løtuni tvey stig framman fyri Rangers á stigatalvuni í Skotlandi.



## Mourinho vil aftur til Chelesa

Jose Mourinho hevur ongan tíð verið bangin fyri, hvat fólk halda um hansara útsagnir, og nú hevur hann aftur givið bæði enskum og italskum miðlum nakað at skriva um. – Um tú spyrt meg, um eg onkran dag komi aftur til Chelsea, so sigi eg ja, men eg veit ikki nær. Samstundis sigur Mourinho, at tað er einføld frágreiðing til, at Chelsea ikki hevur vunnið so nógv seinastu tvey árini. – Tí eg fór úr felagnum. Saman vunnu vit seks steyp, men seinasta hálvaannað árið hevur felagið ikki vunnið nakað, sigur Mourinho.

## Nú er sirkulin komin runt



Nevnir tú flogbólt í Sørvági, sleppur tú ikki undan at nevna Jákup á Stongum, ið umframt at eiga spælarar á bæði kvinnu- og mansliðnum hjá SÍ, eisini er ein av drívandi eldsálunum í felagnum. Hann var sum vera man fegin, nú tað í ár eydnaðist kvinnunum at vinna steypafinaluna.

– Eg síggi soleiðis upp á tað, at sirkulin er komin runt, nú kvinnurnar við steypafinaluni í ár og føroyameistaraheitinum í fjør eru á toppinum. Nú eru vit har, og so er spurningurin, um vit klára at halda okkum har uppi, sigur Jákup á Stongum.

– Tað er stórt, at kvinnurnar nú eru komnar upp á toppin. Vit vita, at tað kann vera so skjótt, at tað fer hinvegin, tí bygdin er ikki so stór. Alt fólkið er við í flogbóltinum, men tað eru jú ikki allir árgangir, sum kunnu geva okkum tað, hesin árgangurin nú hevur givið okkum.

Jákup staðfestir, at kvinnufinalan var góð og at bæði lið vístu fínt flogbóltsspæl allan vegin ígjøgnum. Og hóast hann er sigurssælur, hevur hann eisini rósur at bera kvinnuliðnum hjá Fleyr:

– Fleyr-liðið er gott, og tað verður óivað uppaftur betri við tíðini, tí tær hava hæddina og eru kimiligar eisini. Tað var sanniliga gott, at vit vunnu nú, tí tað er ikki vist, at tað verður so lætt næstu ferð, sigur Jákup á Stongum.

-hil

# Settið mundi ongan enda fingið

**FLOGBÓLTUR**
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tvær av teimum, ið gingu undan á liðnum hjá SÍ, vóru Karin Mikkelsen og Annika á Stongum, ið báðar vóru ovurfegnar, tá dysturin var lokin og tað eydnaðist teimum at vinna.

– Hetta er ótrúliga gott, og eg vil siga, at hetta er líka so gott, sum tað var keðiligt í fjør, tá vit taptu finaluna, sigur Karin Mikkelsen, sum hevur verið í Etiopia og arbeitt í heyst, og ikki kom aftur til landið fyrr enn beint fyri jól.

– Meðan eg var burturi, stúrdi eg fyri, um eg fór at fáa steypafinaluna við, um ikki kom í form. Enn eri eg ikki 100 prosent, men tað lukkaðist at sleppa upp í part, og tað eri eg sera glað fyri. Nú hugsa vit bara um føroyameistaraheitið, sum vit ikki vildu hugsa um, fyrr enn hetta var yvirstaðið.

Karin heldur, at kvinnufinalan fekk ein øgiliga spennandi enda, har tað stóð nokk so nógv á til síðst. – Men tað mundi vera áskoðaravinarligt, tí tað var øgiliga spennandi, sigur hon.



*Liðskiparin hjá SÍ-kvinnunum, Annika á Stongum, við øðrum steypinum, tær fingu við sær aftur til Sørvágs leygardagin. Uttast vinstrumegin sæst eisini Karin Mikkelsen, ið kompenseraði fyri vantandi forminum við sínum eyðkenda stríðsvilja*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*



### Kendis endaleyst

Tað sama sigur Annika á Stongum, ið helt endan á dystinum vera so spennandi, at tað á vøllinum kendist, sum fekk tað ongan enda:

– Tað var sanniliga gott, at tað fall út til okkara fyrimun, tá avtornaði. Og serliga gott var tað, at vit fingu víst øllum, sum hyggja at flogbólti, at vit kundu klára okkum betri í einari finalu, enn vit gjørdu í fjør, sigur hon.

– Kanska gjørdi tað eisini sítt, at vit hesa ferð fyrireikaðu okkum øðrvísi enn í fjør. Tá vóru vit saman við fólkinum áðrenn dystin, men hesa ferð hava vit bara verið heima og gjørt tað vanliga, sum vit plaga at gera fyri dyst. Tí haldi eg eisini, at vit vóru meira róligar nú.




*Fagnaðurin var sjálvandi ovurstórur, tá SÍ-kvinnurnar fyri fyrstu ferð ognaðu sær partabræv í stóra steypinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*